almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



KREA

# SAMSKIPARI
## innan leiðslu og kunning

**Søkt verður eftir samskipara innan leiðslu og kunning til stjóraskrivstovuna á Almannastovuni at byrja skjótast til ber. Á stjóraskrivstovuni eru tveir samskiparar, ið arbeiða tætt saman.**

*Umsóknarfreist: 7. des. 2007, kl. 9.*

Okkara ynski er, at tú hevur politiskt og fyrisitingarligt tev, ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávur í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Starvið er skipað við beinleiðis tilvísing til stjóran, og samskiparin er, saman við hinum samskiparanum, við til at skipa arbeiðið.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið umfatar í høvuðsheitum samskipan av leiðsluuppgávum og fyrireikandi og uppfylgjandi uppgávur í sambandi við fundarvirksemi á leiðslustigi. Starvið umfatar eisini samskipan/samstarv við stovnar undir Almannastovuni, aðrar almennar stovnar, feløg og áhugabólkar, uppgávur viðvíkjandi norðurlendskum samstarvi, kunning og samskifti innanhýsis á stovninum eins og uttanhýsis, og viðvíkjandi myndugleikum og borgarum. Umframt hetta umfatar starvið eisini heimasíðu- og intranetrøkt, eins og aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur útbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi, hevur góðan kunnleika til kunningartøkni, kunnleika til almenna fyrisiting, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

**Løn og setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 353510, ella 215480.

**Umsókn**
Skrivligar umsóknir saman við avritum av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. desember 2007 kl. 9.00.

Umsóknirnar skulu sendast til:
Almannastovuna, Smyrilsvegur 20,
Postsmoga 3096, FO-110 Tórshavn.



Stovnurin, ið veitir lestrarstuðul til lesandi

STUÐULSSTOVNURIN
*The Faroese Student Grant Fund*

# SKRIVSTOVULÆRLINGUR

Ert tú ágrýtin og hugagóð/ur? Vilt tú gerast partur av einum toymi av dugnaligum starvsfólki, ið saman virka fyri at geva lesandi góðar fíggjarligar karmar. So les víðari og send okkum eina umsókn.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Hevur eina miðnámsútbúgving við góðum úrsliti
- Hevur áhuga í skrivstovuyrkinum og arbeiðsøkinum hjá Stuðulsstovninum
- Ert fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

Útbúgvingin tekur 3 ár, um tú hevur FHS, 2 ár og 18 vikur um tú hevur students, HF- ella HT-prógv og 2 ár, um tú hevur HH-prógv.

# MÁLSVIÐGERI

Av tí at eitt av starvsfólkum okkara fer í barnsburðarfarloyvi, er eitt áhugavert starv sum skrivstovufólk/málsviðgeri ¾ tíð leyst at søkja á Stuðulsstovninum.

Vit bjóða tær eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv í einum stovni í menning. Tað er eitt sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Høvuðsuppgávur**
- Málsviðgerð í ÚS-skipanini*
- Vanligar skrivstovuuppgávur

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur:
- Skrivstovuútbúgving, HH/student ella líknandi
- Góðan kunnleika í at brúka edv
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanar- og lønartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til Stuðulsstovnin og stílast til Terja á Lakjuni.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin **10. desember 2007**.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, stjóra á Stuðulsstovninum, á tel. 356800 / 555080

Miðað verður ímóti at tey, ið sett verða, byrja 1. januar 2008.

** Í ÚS-skipanini verður útbúgvingarstuðul veittur til tey, ið lesa í Føroyum.*

Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir **Mentamálaráðnum**, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar. Á Stuðulsstovninum starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 2.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.100 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 2.700 persónum. Stuðulsstovnurin hevði í 2007 eina útreiðslujáttan upp á 2,9 mió. kr. og veitti uml. 92 mió. kr. í lestrarstuðli.

Hoyvíksvegur 72 : Postrúm 3279 : FO 110 Tórshavn
Tel. 356800 : Faks 356801 : studul@studul.fo : www.studul.fo